# MENT ANAR NÁTT

Mentanarnáttin
10. september 2021

Visit Tórshavn

# VÆLKOMIN Á MENTANAR-NÁTT 2021

Klokkan 18.00 verður Mentanarnáttin sett uttanfyri Býráðshúsið. Gunn Hernes, stjóri í Norðurlandahúsinum, heldur setanarrøðuna, og GHM spælir.

**08.00–23.00**
### MARIUKIRKJAN, VARÐAGØTA
Mariukirkjan er opin.

**09.00–21.00**
### STEINPRENT, SKÁLATRØÐ
Framsýning við Rannvá Kunoy, Hansinu Iversen, Hanna Bjartalíð og Julie Sass.

**09.00–23.00**
### H.N. JACOBSENS BÓKAHANDIL, VAGLIÐ 2
16.30 Rithøvundurin og læknin Elsubeth M. Fossádal lesur upp úr barnabókini Alva og Lias.

19.00 Framløga av barnabókini, Abbi og eg og abbi, eftir Dánial Hoydal umframt samrøða við høvundin.

H.N. Jacobsens Bókahandil í samstarvi við Bókadeildina og Føroyar lesa.

**10.00–14.00**
### TJÓÐPALLURIN, TÓRSGØTA
10.00 Sjónleikarar lesa fyri børnum.

11.30 Sjónleikarar lesa fyri børnum.

13.00 Sjónleikarar lesa fyri børnum.

↓

Dagstovnar og skúlaflokkar mugu boða Tjóðpallinum frá fyri at tryggja sær pláss.

Føroyar lesa í samstarvi við Tjóðpallin.

**10.00–19.00**
**SMS, Á TRAPPUTRØÐNI**

16.00 BUBU.

17.00 Land of Maybe.

**10.00–21.00**
**BÝARBÓKASAVNIÐ, N. FINSENSGØTA**

19.30 Tveir ungir yrkjarar lesa sínar yrkingar upp: Dania O. Tausen og Beinir Bergsson. Bartal Augustinussen spælir nøkur løg.

Dania gav yrkingasavnið "Skál" út í fjør, sum snýr seg um ungdóm, átrúnað og at finna seg sjálvan.

Beinir hevur givið tvey yrkingasøvn út. "Tann lítli drongurin og beinagrindin" kom í 2017 og snýr seg um sorg og barndóm. "Sólgarðurin" kom út fyrr í ár og snýr seg um menn, homoseksualitet og kærleika.

Tiltakið er ókeypis og øll eru vælkomin.

## 10.00–23.00
## MYNDLIST, N. FINSENSGØTA 16

Kreativur familjuverkstaður í Williamsstovu. Eisini verður barnavinarlig plakatframsýning og møguligt verður at síggja starvsfólkini arbeiða inni á rammuverkstaðnum hjá Myndlist, sum er á somu hædd sum Williamsstova. Williamsstova er opin til kl. 21.

Fleiri listaverk og plakatir eru til sølu í Myndlist. Kaffi og okkurt søtt verður at fáa.

## 10.00–23.00
## ÖSTRÖM, SKÁLATRØÐ 18

Niðara hædd:

17.30 “Jørð og eldur” framsýning við chawan koppum frá Guðrið Poulsen. Chawan er ein lítil koppur, sum er breiðari um miðjuna, enn hann er høgur. Á framsýningini verða einir 120 chawan koppar til sølu. Eingin er eins. Harumframt fæst snotulig plakat, ið er gjørd til framsýningina, til keyps.

Í samband við framsýningina vísa vit stuttfilm um Guðrið Poulsen, ið Jóna Kristin Thomsen hevur framleitt.

↓

Ovara hædd:

10.00 Sample sale við útvaldum vørum frá Einstakt, Elisu Heinesen og Rebekku á Fjallinum.

21.00 Dania O. Tausen framførur løg frá nýggju fløguútgávuni gonguteigatúnatos.

**10.00–23.00**

**FÓTBÚNI, TRÓNDARGØTA 23**

20.00 Livandi tónleikur við Dániel Gomez uttan fyri handilin hjá Fótbúna.

**11.00–20.00**

**LISTASAVN FØROYA, OMAN VIÐARLUND**

Framsýningin “Heimstaðurin” hongur uppi. Tvær rundvísingar vera í framsýninigini.

17.00 Rundvísing fyri børn (uml. 30 min.)

18.00 Rundvísing fyri vaksin (uml. 45 min.)

Børnini eru vælkomin at seta seg við barna–borðið at gera lítlar standmyndir úr modeller–voksi ella at royna listaveiðuna.

Ókeypis atgongd.

**11.00–22.00**

## SÓLJAN GLASLIST, KARLAMAGNUSARBREYT 11

Opin verkstaður. Hvønn heilan og hálvan tíma er møguleiki fyri at síggja, hvussu vit framleiða okkara glasvørur, har vit blása heitt glas. Handilin er eisini opin.

**15.00**

## KATRINA CHRISTIANSEN, BRINGSNAGØTA 6

Rundferð í søguliga bygninginum. Húsini hava havt minst fýra ymisk nøvn: Bartskerstova, Skálahús, hjá Restorff, hjá Heinesen og hjá Katrinu Christiansen. Umframt vinnuligt virksemi frá bartskerum til handil kann nevnast, at William Heinesen er føddur her og búði síni fyrstu barnaár "hjá Heinesen", sum húsini vórðu rópt tá.

**16.00**

## STANDMYNDATÚRUR, STEINATÚN

Lættur gongutúrur í Havn við ferðaleiðara, har listin er í hásæti. Greitt verður frá 1/3 av standmyndunum í Havn og frá listafólkunum sum hava gjørt tær, umframt at túrurin verður kryddaður við góðum søgum.

Túrurin byrjar og endar í Steinatúni og tekur uml. 90 min. Atgongumerki á kr. 195 kann keypast á www.visittorshavnshop.fo

**16.00–02.00**

**HILTON GARDEN INN, STARAVEGUR 13**

Brúsandi fríggjadagur í Hallartúni barr.

Byrja vikuskiftið við góðum kokkteylum, brúsi, og tónleiki.

17.30 Matstovan letur upp.

**16.30**

**GAMLI KIRKJUGARÐUR, DR. JAKOBSENS GØTA**

Óli Jacobsen vísir runt og greiðir frá.

**16.30–21.30**

**TUTL, GLADE HJØRN**

16.30 Útgávukonsert við Fróða Bjarnason.

21.00 Føroyskur Dansur við Havnar Dansifelag.

**17.00–18.00**

**TJÓÐSAVNIÐ, HOYVÍK**

Nýggi plantufrøðiligi urtagarðurin í Hoyvík hjá Tjóðsavninum verður alment tikin í nýtslu kl. 17.00.

Kolbrún í Haraldsstovu, leiðari á plantudeild Tjóðsavnsins, fer at siga nøkur orð, og Havnar Hornorkestur spælir nøkur løg.

↓

Sum eitt kuriosum, verður møguligt hjá urta-garðseigarum at ogna sær sjáldsomu plantuna lundararmingi fyri 50 kr.

Tað er Annleyg Patursson, sum hevur staðið fyri arbeiðinum at gróðurseta urtagarðin, og hon luttekur eisini í tiltakinum. Hon fer at svara spurningum og annars geva góð ráð.

Tjóðsavnið bjóðar pylsur og heimagjørda rabarbusaft.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**17.00–19.00**

**SMIÐJAN Í LÍTLUVÍK, SKÁLATRØÐ/BØGØTA**

Verkstova fyri børn og ung, sum eru hjartaliga vælkomin inn á gólvið og saman við listafólkum arbeiða við pappíri, leiri, litum v.m.

Listafólkini eru: Charlotte Nielsen, Charlotte Bogh og Ane Meinert Folke, sum eisini sýna fram postalín, myndlist og smúkkur.

**17.00–20.00**

**KONGSHØLL, VESTARA BRYGGJA**

Fróðskaparsetur Føroya og Granskingarráðið skipa í felag fyri filmssýningum í Kongshøll, tá listaligi vísindafilmurin, “Almost Human” verður vístur.

↓

Sýningarnar verða klokkan 17 og aftur klokkan 19 við innleiðslu hjá Ragnheiður Bogadóttir og Firouz Gaini, granskarum.

Sýningarnar eru ókeypis, og ein drekkamuður verður eisini at fáa.

**17.00–20.00**
**SKÚLIN Á FLØTUM, HANS ANDRIASARGØTA 10**

Komið og síggið nýggja og stórfingna skúlabygningin, stóra uttandura spæliøkið og rennibreyt, umframt flotta list.

18.00 Tónleikur við Bárði Johannesen.

**17.00–21.00**
**FØROYA SJÓSAVN, RÆTTARGØTA 1, ARGIR**

Framsýningin er opin. Hálvt atgongugjald, vaksin 20 kr. og børn 10 kr.

**17.00–22.00**
**ELSABECH, J.H. SCHRØTERSGØTA 7**

Hugnaligt sølutiltak. Gávuposar verða latnir til 15 tey fyrstu, ið keypa. Eisini verður stór lagursøla, og ymiskt verður latið fyri hálvan prís. Okkurt leskiligt til góman verður eisini at fáa.

**17.00–23.00**

## TINGHÚSGARÐURIN, N. FINSENSGØTA

Møtið víkingum frá Viking Events, Berserk og Arvakr, og hoyrið um komandi tiltakið Festívalhöll.

Søluframsýning og ymiskt handaligt at royna.

Frá kl. 19.00 til 20.00 ber til hjá 18 ár og eldri at venja víkingabardaga.

**17.00–24.00**

## HAVNAR KLUBBI , TINGHÚSVEGUR 8

Myndirnar av sjónleikarum úr Gamla Klubba.

Kom og síggj gomlu myndirnar av sjónleikarum í Havnini. Søguligu myndirnar hingu uppi í "Teatursalinum" í Gamla Klubba. Dustið er sópað av myndunum, sum verða sýndar fram í Havnar Klubba sjálva mentanarnáttina. Kristin í Geil hevur málað myndirnar í 1920–unum.

**17.00–24.00**

## BOJSENSGARÐUR

Gamli urtagarðurin hjá H.N. Jacobsens Bókahandli er opin.

19.30 Kórið Glymur syngur undir leiðslu av Hans Olivur Joensen.

↓

20.30 Havnarkórið syngur undir leiðslu av Leif Hansen.

21.30 XPERIMENT syngur undir leiðslu av Sigrið Sivertsen.

**17.00–24.00**

**MYNDABOKS OG MIRIAM & JANUS, TÓRSGØTA 16**

Myndaframsýning við familju– og brúðar–myndum, sum Miriam & Janus hava tikið.

16.00 Myndaboks letur upp. Støkkið inn á gólvið og fáið tykkum eitt minni heim við frá Mentanarnáttini 2021. Opið er til á midnátt.

**17.00–04.00**

**LANDSKRONA, TÓRSGØTA 11**

Livandi ítróttur á skíggjanum, pool og dart, føroyskum á krana og góðum mati úr køkinum.

**17.00–04.00**

**SIRKUS FØROYAR, GRÍM KAMBANSGØTA 2**

17.00 Eitt breitt úrval av eldri sum nýggjum føroyskum tónleiki verður spælt alt kvøldið.

18.00 Bjórkovin letur upp við alskyns sløgum av serøl.

↓

23.00 Framførsla/konsert (verður lýst seinni).

24.00 Disking við Jazzy Jazz & Drós.

**18.00**
## GAMLI KOMMUNUSKÚLA-GARÐUR

Mentanarnáttin verður sett uttanfyri Býráðshúsið. Gunn Hernes, stjóri í Norðurlandahúsinum, heldur setanar-røðuna og GHM spælir.

**18.00– 20.00**
## LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, J.C. SVABOSGØTA

Dyrnar lata upp til forvitnislig støð, har borgarar vanliga ikki hava atgongd.

18.00 og 18.30

Gongutúr í tunlinum. Farið verður gongutúr í tunlinum undir sjúkra-húsinum, frá bygningunum á Eirargarði og oman til høvuðsbygningin. Byrjað verður við reyðu lonirnar, haðani gingið verður undir psykiatrisku sjúkra-húsbygningarnar oman til Tænastu-bygningarnar, og haðani undir J. C. Svabosgøtu oman í forhøllina á Lands-sjúkrahúsinum. Túrurin er eitt vet undir 1 km langur og tekur áleið 15–20 min.

↓

Í forhøllini verður bjóðað okkurt leskiligt til góman. Túrarnir byrja við dyrnar til reyðu lonirnar á Eirargarði 14/16.

Í forhøllini fer Fólkaheilsuráðið at bjóða fram heilsukanningar. Til ber at taka blóðtrýst, langtíðar blóðsukur, lungafunktión og vekt (BMI–vøddamassi–feittprosent).

18.00 Framvísing av nýggja bygninginum. Nýggi H–bygningurin er væl áleiðis, og nú ber til at síggja avbera góðu umstøðurnar, sum bæði sjúklingar og starvsfólk fara at fáa. Framvísing verður við bólkum á áleið 10 fólkum. Túrurin byrjar frammanfyri bygningin ímóti sjónum. Frá Álakeri ber til at ganga yvir ímóti bygninginum, har starvsfólk taka ímóti.

18.00–20.00 Út á takið á grøna bygninginum. Frá forhøllini verður møguleiki at ganga 164 trapputrinini upp á 8. hædd og út á takið á grøna bygninginum. Harført tú frálíkt útsýni yvir høvuðsstaðin. Túrurin byrjar í forhøllini.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**18.00–20.00**

## VISTGRØÐI, TRÓNDARGØTA 53

Øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið í Tróndargøtu 53.

Møguleiki er fyri at keypa sær vistfrøðiligar matvørur í leysari vekt. Havið egin íløt við.

Kaffi, te og okkurt søtt afturvið. Verið vælkomin.

**18.00–20.00**

## BURN, N. FINSENSGØTA

Hvat er munurin á armwrestling og tí vanliga sjómanstakinum, vit kenna her heima í Føroyum?

Hoyr nærri um hetta, og áðrenn tú bjóðar okkum ella tínum vinum av, verður greitt frá hvussu mannagongdin er, og hvussu tú sleppur undan skaða.

**18.00–21.00**

## HANS ANDRIASARHÚS, UNDIR PISUVARÐA 2

Býarsavnið hevur opið hús í Hans Andriasar húsum, har til ber hjá fólki at síggja heimið hjá skaldinum Hans Andrias Djurhuus og konuni Petru.

↓

**18.00–21.00**

## TÓRSHAVNAR KOMMUNA, VAGLIÐ

Ráðhúsið og Býráðssalurin eru opin.

**18.00–21.00**

## TÓRSHAVNAR MÓTTØKUHÚS OG MYNDASAVN, TRÓNDARGØTA

Høvi verður at síggja spennandi listasavnið hjá Tórshavnar kommunu.

**18.00–21.00**

## BÝARBÓKASAVNIÐ, N. FINSENSGØTA

SAMTYKKI–kafé.

Sætta árið á rað skipar Amnesty saman við Fólkaheilsuráðnum, Føroya Politi og Sig Frá fyri átakinum "Sex krevur samtykki". Í ár snýr átakið seg um, at FØROYAR ERU EINKI UNDANTAK, tá tað snýr seg um seksuellan harðskap. Støðan er líka ring her heima, sum úti í heimi. Og hetta skal fram í ljósmála. Kom framvið og hoyr meira.

Vit bjóða, sum altíð, ókeypis tatoveringar, og tað verður eisini møguligt at keypa Amnesty taskur og ljós, sum eru framleidd av Dugna úr endurnýtslutilfari.

Amnesty Ung skipar fyri.

**18.00–22.00**

**RÍKISUMBOÐIÐ, LAÐABREKKA**

Umframt, at prýðiligi Amtmansgarðurin er opin, verður boðið innar í stovurnar/móttøkustovurnar og skrivstovurnar hjá Ríkisumboðnum.

19.00 Morgunkórið syngur.

20.00 SEV kórið syngur.

21.00 XPERIMENT syngur.

**18.00–22.00**

**RENT A BIKE & OUTDOOR, SVERRISGØTA 20**

Súkklucafé og framsýning av ENDURA uttandura klæðum. Serlig tilboð vera latin. Les meira á facebook.com/rentabikeoutdoor.

**18.00–23.00**

**NORÐLÝSIÐ, UNDIR BRYGGJUBAKKA**

Opið skip.

22.00 Um veðrið loyvir tí, fer Norðlýsið kvøldartúr. Atgongumerki á 1.250 kr. kann keypast á www.tn24.fo.

## 18.00–23.00

## HUGFLOG, PÆTURSASTOVA, BRINGSNAGØTA 3

Opið hús.

Alt er í rørslu. Listarligur stuttfilmur, um improvisatión innan modernaðan dans. Dansarar: Búi Rouch og Vár Bech Árting. Framleiðsla og hugskot: Jóna K. Thomsen.

Kaffi verður at fáa.

## 18.00–04.00

## LOCA, SVERRISGØTA 15

Gestakokkurin Kob Nara Kiddee fer at gera kenda tailendska rættin, Pad Thai. Køkurin letur aftur kl. 24.00.

## 18.15–20.00

## BETRI BANKI, Í MIÐBÝNUM

18.15 Konsert við Danny og Inga uttanfyri Gróthúsið.

20.00 Konsert við Høgna Lisberg uttanfyri Gróthúsið.

Bassi bjóðar børnunum ballónir og okkurt gott.

## 18.30

### FELAGIÐ TÓRSHAVN, GONGUBÓLKURIN

Spákað verður eftir gøtuni fram við Sandá heim í Miðbýin.

Túrurin byrjar á Krossinum við virkisbygningin hjá Nomatek við gamla Velbastaðvegin.

Gongutúrurin er ókeypis, og tað er ikki neyðugt við tilmelding.

## 18.30–23.00

### OSTAHÚSIÐ, TÓRSGØTA

Elin K.J_smúkkur og Herborg Torkilsdóttir tilevna og selja serstakar smúkkur.

## 18.45–19.00

### GIRL HOP CREW, N. FINSENSGØTA, UTTANFYRI BURN

Nýggjur dansibólkur settur saman av Dianu Hansen og Rannvu Klettheyggj. Tær eru í aldrunum 10 til 13 ár, og fara at dansa hiphop new school, house og whacking.

## 19.00–22.00

### FØROYA RÆTTUR, C. PLØYENSGØTA

19.00 Opið á Dómaraskrivstovuni.

20.00 Framleiddur filmur um rættarfund.

21.00 Framleiddur filmur um rættarfund.

22.00 Húsið letur aftur.

Umframt framleidda filmin um rættarfund, er møguleiki at síggja almennu hølini hjá okkum.

Møguleiki verður at fáa kaffi/te og smákøkur. Verið vælkomin.

## 19.00–23.00

### FØROYA ELLISAKFØR, TÓRSGØTA

Ellisakførini møtast í hølunum Yviri við Strond 20 og koyra í skipaðum raðfylgjum gjøgnum býin. Ellisakførini savnast síðan í Tórsgøtu, har tey verða sýnd fram.

## 19.30–23.00

### HAVNAR KIRKJA

19.30 Orgultónleikur við næmingum á Tórshavnar Musikkskúla.

20.30 Tórshavnar Manskór syngur.

↓

21.30 &Bartal.

Bartal Augustinussen, sangur, guitar. Rebekka Petersen, sangur. Karl Andreas Stórá, bas, Hjørtur Pætursson Háberg, trummur og Vár Miðberg, trummur.

22.30 Gospelkórið Brak undir leiðslu av Ingmar Mikkelsen.

**20.00**

## AULAN Í FINSEN, FINSEN

Konsert við Jóannesi Andreassen.

**20.00 OG 21.00**

## LANDSSTÝRIÐ, TINGANES

Rundvísing í gomlu húsunum á Tinganesi. Í ár verður vitjað í Skansapakkhúsinum, Salinum, Sjóbúðini og Vektarbúðini. Tiltakið er ókeypis, men tað er avmarkað atgongd.

**20.00–22.00**

## HAVNAR TELVINGARFELAG, SANGSTOVAN Í FINSEN

Almenn simultantelving í Havnar Telvingar–felag. 15 ára gamli Luitjen Akselsson Apol telvar móti fleiri ísenn.

Áhugaðum stendur frítt at royna seg. Telvað verður í hølum felagsins í sangstovuni ovast í Finsen.

**21.00–23.00**

**CITY CHURCH, TRÓNDARGØTA 36**

Spennandi ungdómstiltak við góðum tónleiki og hugnaligari kafe. Tað verður vilt, hart og øðrvísi. Kom við og uppliv hvussu samkomutónleikur eisini kann vera.

**22.00**

**REINSARÍIÐ, TÓRSGØTA**

Uppistand – Stand Up úr Íslandi.

Vanliga framføra teir fimm – Donal Vaughan (ÍR), Eggert Smári Sigurðsson (ÍS), Hugh Coverdale Jones (GB), Dávur í Dali (FO) og Þórhallur Þórhallson (ÍS) – á The Secret Cellar Comedy Club í Reykjavík, men á Mentanarnáttini fara teir at undirhalda á Reinsarínum.

↓

Ein loyniligur gestur, sum javnan er á palli í Føroyum, verður eisini við. Hon byrjar við A og endar við strið. Atgongumerki á 150 kr. fæst til keyps á torsgota.fo.

**22.30–23.00**

**LINEDANSUR, VAGLIÐ**

Linedansarar úr Dansifrøi fara at dansa linedans á Vaglinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at luttaka.

**23.00–04.00**

**ESSABARR, ÁARVEGUR 7**

Livandi tónleikur. Ókeypis atgongd.

23.00 Jens Marni live.

**24.00**

**PERLUTÚNIÐ, TÓRSGØTA**

Konsert við Joe & The Shitboys og Marius DC í Perlutúninum.

**24.00–04.00**

**IRISH PUB, GRÍMS KAMBANSGØTA 13**

Livandi tónleikur við Kim Hansen. Ókeypis atgongd.

## FLEIRI TILTØK VERÐA AFTURAT HESUM, M.A. VERÐUR TÓNLEIKUR YMSASTAÐNI Í BÝNUM. HANDLAR Í BÝNUM HAVA OPIÐ TIL KLOKKAN 23.00

# KOMIÐ VIÐ Á EINA SPENNANDI MENTANAR-FERÐ GJØGNUM HAVNARGØTUR

Undirhald, upplivingar og stuttleiki til børn og vaksin. Handlar hava opið til klokkan 23.00

Visit Tórshavn